

# Biðjur um pening til Tjóðpallin

**SJÓNLEIKUR** Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, mælir til at seta eina millión á fíggjarlógina til Tjóðpall Føroya

Randi Jacobsen

Ein arbeiðsbólkur handaði í desember í fjør Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í mentamálum eitt uppskot um høli til Tjóðpall Føroya, og henda loysn krevur ikki nakra ovurhonds stóra íløgu.

Uppskotið er at lata Tjóðpallin fáa Bakaríið hjá Frans Restorff í staðin fyri Gamla Meiaríið, ið Tórshavnar kommuna nú í fleiri ár við vælvild hevur lænt Tjóðpallinum.

Síðan landsstýriskvinnan fekk uppskotið fyri 10 mánaðum síðan, hevur hon havt fund við Heðin Mortensen, borgarstjóra í Havn um málið.

Helena Dam á Neystabø heldur, at møguleikin við Bakarínum er so góður, at hann ikki má fara fyri skeytið.


## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá kæri maður mín

**Kaj Nolsøe**
**Sandi**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum á Áargarði, sum vóru so góð við hann ta tíðina, hann búði har.
Tøkk til prestarnar Jákup Reinert Hansen og Derhard Jógvansson fyri góð orð á Áargarði og í kirkjuni.
Tøkk til berarar, sangarar, kirkjutænarar, tykkum, sum hjálptu so væl til við ervinum, og øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri gávur til Alzheimersfelagið og fyri blómur, kransar og aðrar heilsanir.
Hjartaliga tøkk øll somul

**Anna Sofía**


# Christian avloysir bygdarmann

**STJÓRASKIFTI** 1. november verður stjóraskifti á Samskip, tá húsavíkingurin Christian Danielsen loysir húsavíkingin Joel undir Leitinum av



*Útskifting í stjórastólinum á Samskip, har Christian Danielsen (høgrumegin) loysir Joel undir Leitinum, sum fer í BankNordik at starvast, av*

Mynd: Álvur Haraldsen

Leo Poulsen

Nú eru liðin seks ár síðani Samskip etableraði seg her í Føroyum, og øll árini hevur Joel undir Leitinum sitið í stjórasessinum.

– Vit hava arbeitt fyritøkuna upp frá grundini av til hon í dag er millum førandi fyritøkurnar á marknaðinum, sigur Joel undir Leitinum.

Í dag eru tilsamans 54 ársverk í fyritøkuni í Føroyum, sum millum annað rekur skipini Arnarfelli og Helgafelli.

– Á landi eru eini 15 fólk í føstum starvi umframt ein røð av tímaløntum fólki. Vit reka eisini eina frystigoymslu í Kollafirði, sum við sínum 7.000 tonsum er landsins størsta, sigur Joel undir Leitinum.

Hann fer frá stjórastarvinum á Samskip til eitt starv sum leiðari fyri Corporate Finance hjá BankNordik.

– Hetta er ein spennandi avbjóðing fyri meg, tí júst hetta var mítt spesiali, tá eg læs, sigur Joel undir Leitinum.

Eisini Christian Danielsen er spentur upp á nýggja starvið. Hann kemur frá einum starvi sum fíggjarleiðari hjá Articon, har hann hevur verið í trý ár, og millum annað hevur upplivað heiðurin at arbeiðspláss hansara var valt til ársins virki.

– Hetta verður fyri meg ein spennandi uppgáva. Felagið hevur eina góða støðu á marknaðinum, og er meti eisini vinnuna, sum felagið arbeiðir innan fyri, at vera bæði spennandi og avbjóðandi, sigur komandi stjórin í Samskip, Christian Danielsen.

Báðir taka teir við sínum nýggja starvi 1. november.

# ES vil ikki banna oljuboringum

**OLJUVINNA** ES tingið vil ikki banna oljuborginum á djúpum vatni. Ístaðin verða krøvini til trygd og til endurgjald herd.

Jan Müller

ES tingið hevur felt eitt uppskot um at seta í verk eitt moratorinum ímóti at bora eftir olju og gassi á djúpum vatni. Ístaðin hevur tingið sett fram ynski um at herða krøvini til trygdina og til endurgjald, um oljudálking tekur seg upp.

Tað var í farna mánað, at umhvørvisnevndin í ES samtykti at heita á ES tingið um at banna allari boring á djúpum vatni eftir vanlukkuna í Meksikoflógvanum.

Mikudagin segði bretski orkumálaráðharrin Chris Huhne á eini vitjan í Hetlandi, at boring á djúpum vatni í bretskum sjógvi fer at halda fram uttan mun til, hvørja avgerð ES tingið varð komið fram til.

Hetta veit Shetland Times at siga frá í kvøld. Greenpeace felagsskapurin hevur seinastu tíðina roynt at forða boriskipinum Stena Carron at bora ein brunn vestan fyri Hetland og heitti samtíðis á bretska orkumálaráðharran um ikki at geva loyvi til boring vestan fyri Hetland.

Hóast hetta hevur Huhne latið oljufelagnum Chevron loyvi til at fara undir at bora Lagavulin prospektið 160 fjórðingar norðan fyri Hetland og 50 fjórðingar frá føroyska markinum. Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum er við í hesi boringini.

323 atkvøddu ímóti at steðga boring á djúpum vatni og 285 fyri, tá ES tingið viðgjørdi eina samtykt í umhvørvisnevndini í ES. 601 tinglimir vórðu tó fyri at seta størri krøv til trygdina í sambandi við boringar.

*jan@sosialurin.fo*